6. mars 2021

# Ársroknskapur 2020

## Føroyingafelagið í Aalborg

## Årsregnskab 2020

Forchhammersvej 5-7
9000 AALBORG
www.alaborg.fo
alaborg@alaborg.fo

# Innihaldsyvirlit / *Indholdsfortegnelse*

**Góðkenning / *Godkendelse*** ..... 2

**Leiðslufrágreiðing / *Ledelsesberetning*** ..... 3

**Rakstrarroknskapurin / *Resultatopgøresle*** ..... 7

**Fíggjarstøða / *Balance*** ..... 8

**Notur / *Noter*** ..... 9

- **Nota 1 – Inntøkur / *Indtægter*** ..... 9
- **Nota 2 – Útreiðslur til tiltøk / *Aktivitetsudgifter*** ..... 10
- **Nota 3 – Hølisútreiðslur / *Lokaleomkostninger*** ..... 11
- **Nota 4 – Leysafæ / *Løsøre*** ..... 12
- **Nota 5 – Vørugoymsla / *Lager*** ..... 12
- **Nota 6 – Tøkur peningur / *Likvider*** ..... 12

---

Ársroknskapurin umfatar allar inntøkur, útreiðslur, ognir og skuldir, ið viðvíkja felagnum.

Årsregnskabet omfatter alle indtægter, udgifter, aktiver og passiver, der vedrører foreningen.

Vørugoymslan er tald og er virðið ásett til endurútvegan.

Varelager er optalt og værdien er fastsat til genanskaffelse.

Millumverandi við peningastovnar er avstemmað.

Mellemværende med penge- og kreditinstitutter er afstemmet.

Í 2020 var limatalið 282, harav vóru 233 vaksin og 49 børn.

I 2020 var medlemstallet 282, heraf var 233 voksne og 49 børn.

# Góðkenning / *Godkendelse*

Ársroknskapurin fyri 2020 verður, saman við ársfrágreiðingini, lagdur fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Årsregnskabet for 2020 bliver, sammen med formandsberetningen, lagt for generalforsamlingen til godkendelse.

Aalborg, hin 06. mars 2021

**Nevnd / *Bestyrelse:***

Erika Hjalgrimsdóttir (Forkvinna / Forkvinde)

Jóhanna Ortind (Næstforkvinna / Næstforkvinde)

Gunn Zachariasen (Peningarøkil / Kasserer)

Henný Rógvadóttir (Skrivari / Referent)

Anja Magnussen

Eyðstein Borgardal

Ingi Kárason Midjord

Aalborg, den 06. marts 2021

**Grannskoðari / *Revisor:***

Jón Sigurð Heinesen
(Innanhýsis grannskoðari / Intern revisor)

**AÐALFUNDARSAMTYKT / *Generalforsamlings vedtagelser***

Soleiðis góðkendur á ársaðalfundi hin, 06. mars 2021.

*Således godkendt på generalforsamling den, 06. marts 2021.*

Fundarstjóri / *Dirigent*

# Leiðslufrágreiðing / *Ledelsesberetning*

**Høvuðsvirksemi felagsins**

Føroyingafelagið í Aalborg virkar sum miðdepil fyri føroyskar útisetar í Aalborg og Norðurjútlandi. Endamálið við felagnum er at skipa fyri tiltøkum, ið eru við til at knýta sambond millum útisetar, umframt at stimbra og varðveita sambandið við Føroyar, føroyska samleikan og føroyska mentan.

**Serlig viðurskifti**

Roknskaparárið 2020/2021 hevur verið nógv merkt av Koronu farsóttini, ið hevur ført við sær, at virksemi felagsins hevur verið avmarkað til tiltøk á netinum. Av tiltøkum á netinum kunnu nevnast páskagudstænasta, flaggdagshald og pubquiz. Sostatt hava afturvendandi viku- og mánaðarlig tiltøk – sum vanliga fevna um eitt nú sunnudagsskúla, pubquiz í hølum felagsins, innandura ítróttur, herímillum fótbóltur, flogbóltur og barnafimleikur – ikki verið ein møguleiki stóran part av árinum. Somuleiðis hava einstøk tiltøk, ið vanliga eru afturvenandi ár um ár, herímillum ræstkjøtaveitsla, føstulávint, føroysk karnevalgonga, jólaveitsla og skattaveiða fyri børn ikki verið á skrá. Avlýsingar hava havt við sær, at felagið hevði 25 kassar av útgingnum øli, ið upprunaliga bleiv keypt inn til ræstkjøtaveitslu, ið eftir ætlan skuldi vera í mars 2020. Hesir eru burturbeindir. Felagið liggur eisini inni við 60 kg av frystum røstum kjøti, sum væntandi eisini verður koyrt burtur.

Av tí, at virksemið felagsins hevur verið avmarkað, hevur tað ikki verið gjørligt at gagnnýtt allan fíggjarstuðul, ið verður veittur felagnum.

**Gongdin í virksemi og fíggjarligum viðurskiftum felagsins**

Serlig viðurskifti hava ført við sær, at inntøkur og útreiðslur felagsins hava verið munandi minni enn undanfarna ár. Av mistum inntøkukeldum kunnu nevnast pubquiz í hølum felagsins, ræstkjøtaveitsla, føroysk karnevalgonga og jólaveitsla. Inntøkur í 2020 lógu á kr. 145.691, meðan útreiðslur í 2020 lógu á ávikavist kr. 61.302 til virksemi felagsins og kr. 24.844 til hølisútreiðslur. Hettar er munandi minni enn í 2019, tá inntøkur lógu á kr. 270.824, meðan útreiðslur lógu á ávikast kr. 125.020 til virksemi felagsins og kr. 34.943 til hølisútreiðslur. Limatalið er fallið eitt vet frá 327 í 2019 til 282 í 2020.

**Framtíðarútlit**

Roknskaparárið 2021/2022 verður eisini merkt av Koronu farsóttini. Hettar sæst við at felagið hevur avlýst øll afturvendandi viku- og mánaðarlig tiltøk í januar, februar og mars mánaða. Harafturat verður ongin ræstkjøtaveitsla áðrenn summarsteðgin 2021, og føroyska karnevalgongan 2021 verður væntandi ikki sum hon áður plagar at vera. Tó hevur felagið væntanir um at taka okkurt

virksemi upp aftur í næstum, tá ið almennu tilmælini loyva tí. Herímillum kunnu nevnast ítróttarlig tiltøk og barnatiltøk.

Hóast felagið ikki fekk gagnnýtt allan fíggjarligan stuðul í 2020, hevur felagið lagt eina fyribils ætlan fyri, hvussu stuðulin skal nýtast framyvir. Aalborg Kommuna er í holt við at umvæla hølini á Forchhammersvej 5-7, har hølisleigan væntandi fer at hækka. Kommunan hevur útvegað eini fyribils hølir, inntil umvælingin er liðug eftir summarsteðgin. Umvælingin hevur við sær, at eitt nú mánaðarlig pubquiz ikki verður sum áður, sum hevur við sær, at felagið missur nakað av tí inntøku, ið barrin fær inn. Umvælingin hevur eisini við sær, at felagið hevur tørv á einum høli til útgerð, ið verður nýtt til ymisk tiltøk. Tí hevur felagið í 2021 leigað eina garagu, ið verður nýtt til at goyma bátar til karneval, grillir, gassgrýtir o.a. Harafturat er felagið í holt við eina verkætlan, har ætlanin er at stovna eitt føroyskt ítróttarfelag við ymiskum ítróttargreinum. Hettar ynskir føroyingafelagið at raðfesta pening til.

Føroyingafelagið hevur góðar vónir um at taka alt virksemi upp aftur sum áður eftir summarsteðgin.

***Virksomhedens hovedaktiviteter***

Færingernes forening i Aalborg er midpunkt for færinger i Aalborg og Nordjylland. Formålet med foreningen er at afholde arrangementer, som er med til at skabe relationer mellem færinger såvel som at styrke og bevare relationen til Færøerne, den færøske identitet samt færøsk kultur.

***Særlige forhold***

Regnskabsåret 2020/2021 har været meget påvirket af Corona pandemien, som har resulteret i, at foreningens aktiviteter har været begrænset til online arrangementer. Af online arrangementer kan nævnes påskegudstjeneste, flagdag og pubquiz. Således har tilbagevendende ugentlige og månedlige arrangementer – som normalt omfatter eksempelvis søndagsskole, pubquiz i foreningens lokaler, indendørs sport, herimellem fodbold, volleybold og børnegymnastik – ikke været muligt en stor del af året. Samtidig har enkelte arrangementer, som normalt er tilbagevendende hvert år, herimellem forårsfest, fastelavn, færøsk karnevalparade, julefrokost og skattejagt for børn ikke været på skemaet i år. Aflysinger af arrangementer har resulteret i, at foreningen havde 25 kasser spildt øl, som oprindeligt blev købt til forårsfesten, der efter planen skulle afholdes i marts 2020. Disse er blevet destrueret. Foreningen har 60 kg fermenteret kød i fryseren, som også forventes at blive smidt ud.

Da foreningens aktiviteter har været begrænset, har det ikke været muligt at udnytte al økonomisk støtte til fulde.

***Udviklingen i foreningens aktiviteter og økonomiske forhold***

Særlige forhold har medvirket til, at foreningens indtægter og udgifter har været en del lavere end forrige år. Af tabte indtjeningskilder kan nævnes pubquiz i foreningens lokaler, forårsfest, færøsk karnevalparade og julefrokost. Indtægter i 2020 udgjorde kr. 145.691, mens udgifter i 2020 udgjorde henholdsvis kr. 61.302 til foreningens aktiviteter og kr. 24.844 til lokaleudgifter. Dette er væsentligt mindre end i 2019, hvor indtægter udgjorde kr. 270.824, mens udgifter udgjorde henholdsvis kr. 125.020 til foreningens aktiviteter og kr. 34.943 til lokaleudgifter. Medlemstallet er faldet en smule fra 327 i 2019 til 282 i 2020.

***Fremtidsudsigt***

Regnskabsåret 2021/2022 vil også være påvirket af Corona pandemien. Dette afspejles i, at foreningen har aflyst tilbagevendende ugentlige og månedlige arrangementer i januar, februar og marts måned. Derudover afholdes ingen forårsfest før sommerferien 2021, og den færøske karnevalparade 2021 forventes ikke at være som den plejer. Foreningen har dog forventninger til at snart genoplive noget af aktiviteterne, når retningslinjerne giver lov til det. Herunder kan

nævnes sportslige arrangementer samt arrangementer til børn.

På trods af, at foreningen ikke har udnyttet al økonomisk støtte i 2020, er en midlertidig plan lagt for, hvordan støtten skal bruges fremover. Aalborg Kommune er i gang med at renovere lokalerne på Forchhammersvej 5-7, hvor lokaleudgiften forventes at stige efterfølgende. Kommunen har fremskaffet midlertidige lokaler, indtil renoveringen er færdig efter sommerferien. Renoveringen vil betyde for foreningen, at den månedlige pubquiz ikke afholdes som den plejer, som resulterer i, at foreningen taber noget af den indtjening, som baren står for. Renoveringen betyder også, at foreningen har brug for opbevaringsplads til udstyr til diverse arrangementer. Derfor har foreningen i 2021 lejet en garage til opbevaring af både til karneval, grille, gasgryder m.m. Ydermere er foreningen i gang med et projekt, hvor planen er at stifte en sportsklub med diverse sportsgrene. Dette ønsker foreningen at sætte penge af til.

Færingernes forening i Aalborg har gode forventninger til at genoplive alle aktiviteter som normalt efter sommerferien.

# Rakstrarroknskapurin / *Resultatopgøresle*

| Nota<br>*Noter* | | |
|---|---|---|
| 1 | Inntøka í alt<br>*Indtægter i alt* | 145.691 |
| 2 | Útreiðslur til tiltøk<br>*Aktivitetsudgifter* | - 61.302 |
| 3 | Hølisútreiðslur o.a.<br>*Lokaleudgifter o.l.* | - 24.844 |
| | **Ásins úrslit**<br>***Árets resultat*** | **59.545** |

# Fíggjarstøða / *Balance*

| Nota<br>*Noter* | Ogn / *Aktiver* | | Passivur / *Passiver* | |
|---|---|---|---|---|
| 4 | Leysafæ<br>Løsøre | 51.930 | Felagið hevur onga skuld, og tí er eginpeningurin 100% | |
| 5 | Vørugoymsla<br>*Lager* | 4.960 | *Foreningen har ingen gæld, hvorfor egenkapitalen er 100%* | |
| 6 | Tøkur peningur<br>*Likvider* | 199.526 | | |
| | **Í alt / *i alt*** | ***256.416*** | **Eginpeningur / *Egenkapital*** | ***256.416*** |

# Notur / *Noter*

## Nota 1 – Inntøkur / *Indtægter*

| | |
|---|---|
| Limagjøld<br>*Kontingent* | 30.995 |
| Stuðul<br>*Støtte* | 113.143 |
| Luttøkugjøld til tiltøk<br>*Entré til arrangementer* | 58 |
| Søla til tiltøk<br>*Salg til arrangementer* | 1.495 |
| **Í alt / *I alt*** | **145.691** |

## Nota 2 – Útreiðslur til tiltøk / *Aktivitetsudgifter*

| | |
|---|---|
| Drekkivørur<br>*Drikkevarer* | 16.473 |
| Matur o.l.<br>*Mad o.a.* | 18.729 |
| Samsýning<br>*Løn* | 9.359 |
| Leiga av veistluhølum<br>*Leje af festlokaler* | 250 |
| Ymiskt<br>*Diverse* | 16.491 |
| **Í alt / *I alt*** | **61.302** |

## Nota 3 – Hølisútreiðslur / *Lokaleomkostninger*

| | |
|---|---|
| Leiga Álastova<br>*Leje foreningshus* | 6.413 |
| Leiga av ítróttarhølum<br>*Leje af idrætshaller* | 5.751 |
| Íløgur<br>*Investeringer* | 5.093 |
| Internet, tlf o.l.<br>*Internet, tlf o.a.* | 798 |
| Ymiskt<br>*Diverse* | 6.790 |
| **Í alt / *I alt*** | **24.844** |

## Nota 4 – Leysafæ / *Løsøre*

Meting av virðinum á ognum felagsins
*Vurdering af værdi af foreningens egendele*

| | |
|---|---|
| Útgerð til tiltøk<br>*Udstyr til arrangementer* | 18.660 |
| Innbúgv<br>*Indbo* | 25.270 |
| Ymiskt<br>*Diverse* | 8.000 |
| **Í alt / *I alt*** | **51.930** |

## Nota 5 – Vørugoymsla / *Lager*

| | | |
|---|---|---|
| Óásettir øl-kassar (200,- pr. stk)<br>*Uåbnede øl-kasser (200,- pr. stk)* | Antal: 4 | 800 |
| Óásettar Spiritusfløskur (150,- pr. stk)<br>*Uåbnede Spiritusflasker (150,- pr. stk)* | Antal: 17 | 2.550 |
| Óásettar likørfløskur (40,- pr. stk)<br>*Uåbnede likørflasker (40,- pr. stk)* | Antal: 3 | 450 |
| Óásettar vínfløskur (40,- pr. stk)<br>*Uåbnede vinflasker (40,- pr. stk)* | Antal: 29 | 1.160 |
| **Í alt / *I alt*** | | **4.960** |

## Nota 6 – Tøkur peningur / *Likvider*

| | |
|---|---|
| Kassapeningur<br>*Kassebeholdning* | 5.885 |
| Danske Bank - konta 1551-0001606549<br>*Danske Bank - konto 1551-0001606549* | 193.641 |
| **Í alt / *I alt*** | **199.526** |